# Petur Bjarnastein til minnis



Petur Bjarnastein var ein sera góður basssangari. Nú hevur hann lagt nótablaðið og sungið sítt síðsta lag her í hesum heimi. Siti við einum V. U. Hammershaimb - einum hundraðkrónuseðili framman fyri mær. Henda seðil fekk eg frá Peturi eftir konsertina 17. apríl í Fuglafjarðar kirkju, áðrenn farið varð til Danmarkar og Svøríkis á konsertferð við Fuglafjarðar sangkóri. Magda og Petur sótu hetta konsertkvøld so elskulig mannfólkamegin í stóli nummar fýra uttast við.

Hugfarsligt var at sita millum Jakku Lundsbjerg og Petur Bjarnastein, tá ið Herluf mýkti røddirnar undir venjingunum í sangkórinum. Teir vóru sera nótafastir og høvdu gott gehør. Skemtiligt var tað eisini. Eitt kvøldið segði Petur við Herluf, meðan vant varð: " Herluf, skulu vit ikki fara til "Ulla-Pool" á konsertferð?" Hetta var í tí tíðini, tá føroyingar seldu sild í Skotlandi, og hon varð skipað upp í "Ulla-Pool".

Oddfríður Haraldsen, sálið, helt fyri, beint áðrenn hann doyði, at hann hevði sungið fimmti ár við Fuglafjarðar sangkóri, men honum untist ongantíð at koma uttanlands at syngja. Tað sama kundu Petur og Jakku siga, men glað vóru tey, um kórið bert rakk út um Gøtueiðið og sungið varð onkunstaðni uttanfyri; men teimum lá hjartanum næst at syngja so ofta í Fuglafirði sum gjørligt.

Petur var tann síðsti av teimum fyrstu, sum var við frá byrjan av. Fleirirøddaður sangur hevur ljómað í Fuglafjarðar kirkju síðani 1925. Serligur hátíðardámur hevur verið í kirkjuni jólakvøld, tá ið kórið í sínum besta skrúð, er komið inn eftir gólvinum við Herluffi síðst í hópinum og sungið jólaløg undir guðstænastuni jólakvøld. Vit, sum eru eitt sindur yngri, minnast hesar løtur sum eina góða uppliving líka frá barnsbeini av.

Petur helt uppat við at syngja fyri bert heilt fáum árum síðani. Hann hevði ein djúpan bass, sum eg ikki havt hoyrt síðani. Hann liggur nú saman við mongum øðrum sangarum Um heygar og bíðar eftir uppreisanartónanum.

Sum sagt, stakk Petur mær ein hundraðkrónuseðil í lógvan eftir konsertina 17. apríl og ynskti okkum góða konsertferð. Kundi hugsað mær at viska V.U. Hammershaimb burtur av seðilinum, sett mynd av Peturi ístaðin og fingið myndina í glas og ramma sum eitt varandi minni um ein góðan sangara, skemtara og vin.

**Frits**

# Ingu Falkvard Danberg til minnis



Tann 20. Mars andaðist okkara kæri starvsfelagi Inga F. Danberg.

Tað er óskiljandi at henda lívsterka, glaða og arbeiðssama kvinna ikki er ímillum okkum meira. Ja so óveruligt, at tað er sum um ein bert gongur og bíðar eftir til hon aftur trínur inn í handlinum í Niels Finsensgøtu og tú aftur kannst hoyra hennara gneggjandi látur og upplivað hennara lætta lyndi. Tankin um at ein ikki skal síggja hana aftur gevur onga meining. Saknurin er ómetaliga stórur og eftir henni stendur eitt stórt tómt hol.

Inga hevði fyri okkum starvsfelagar sera stóran týdning.

Fyrsta uppfatan tú fekk av henni var, at hon var bersøgin og hevði sín heilt serliga hátt at siga og gera tingini uppá. Men tá tú lærdi hana at kenna, fanst tú útav, at hon var sera ósjálvsøkin. Hon hugsaði altíð um hini fyrst, var altíð gevarin, men kravdi einki afturfyri. Hevði tú trupulleikar á arbeiðinum ella persónliga, kundi tú altíð fara til hana, tí her hevði tú ein persón, sum tú kundi tosa við í trúnaði og tú fekk altíð eitt greitt svar.

Tú kundi mangan undrast yvir alt íð hon kundi náa. At arbeiða í handli krevur nógv av einum, kortini so hevði hon stundir at venja hondbólt, verða um familjuna, skilja fisk við pápanum vesturi í Sørvági, ganga á fjall og ikki so sjáldan samlaði hon okkum starvsfelagarnar um borið í køkinum við nýbakaðum bollum ella køku. Ja, Inga var eitt satt konubrot við einum heitum hjarta, sum elskaði at fjálga um tey sum stóðu henni nær.

Nú tíðin er komin til ta árligu útferðina, renna tankarnir aftur til tann ógloymandi túrin úti í Mykinesi seinasta ár, har hon vísti okkum runt á sínum himmiríkið á jørð.

Henda oyggj sum hon hevði so stóran tokka til, og sum hon so mangan fortaldi okkum um.

Vit eru sera takksom fyri at vit sluppu at upplyva hana úti í Mykinesi.

Tín tíð her á jørð gjørdist ikki long, men hóast hettar so náddi tú meir enn mong náa eitt langt lív.

Hví tú Inga skuldi fara so ung, fáa vit ikki at vita - helst hevur Guð ikki kunna verið hendan eingilin fyriuttan meira.

Takk Finn, fyri at tú alla tíðina kunnaði okkum um støðuna hjá Ingu gjøgnum sjúkraleguna. Hetta gjørdi tú hóast tað var ein svár tíð tit fóru ígjøgnum.

Er saknurin av Ingu, hjá okkum stórur, so kann tað ikki lýsast hvussu stórur hann eigur at verða hjá tykkum, Finn og børnunum, Vinjard, Marjun og Pola. Tit vóru hennara eitt og alt og Inga tosaði eisini altíð um tykkum.

Við hesum fátøku orðum vilja vit lýsa frið yvir minni um okkara kæra starvsfelaga og vin Ingu F. Danberg

**Starvsfelagarnir**

### Minningarorð um

# Mallu Joensen f. Hansen

### f. 30.09.1913 í Leirvík d. 08.05.2002 á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi

# Theodor Joensen

### f. 16.09.1914 á Eiði d. 07.09.1942 undir Vestmannaoyggjunum við »Tór II«

Tey búðu á Eiði.

Malla var dóttir Lenu og Hanus í Leirvík og Theodor var sonur Siggu hjá Hans Andreasi á Eiði.

Mamma fór at tæna hjá Hans Joensen í Havn sum ung genta. Har var hon fyri tí óhappi at detta niður ígjøgnum ein lem og fáa skaða. Maria, dóttir Hans og Anitu og mamma vóru bestu vinkonur, høvdu sama føðingardag og sama ár.

Tey hjá Hans Jeonsen tóku sær væl av mammu og tá Maria giftist við Chr. Restorff tóku tey sær av mammu. Pápi og mamma giftust 30.10.1935. Fingu 2 synir eg(Gunnar) f. 18.08. 1936 í Klaksvík og Hans Andreast f. 03.09.1940 føddur á Eiði.

Pápi var formaður í Glottanum eina tíð og fekk í lag at stovna begravilsiskassan á Eiði, so fólk kundu fáa hjálp í slíkum føri.

Á fyrsta flaggdagshaldi sum var hildið á Eiði 25. apríl 1941, bar pápi Merkið, Eiðis ljómfelag spældi og Eli í Andrasstovu helst flaggdagsrøðuna.

Mamma var óføR til alt handarbeiði og sera góð til matgerð. Hon savnaði genturnar inn til sín at binda, hekla, broderað og gimpa, hon læs nógvar søgur fyri børnum, so sum Mary Jones og Bíbliu hennara og aðrar líknandi bøkur.

Mamma plagdi at siga, at kríggið tók Theodor og friðurin tók Gunnar. Tá tað kom til krígslok í 1945, mátti eg fara niður til Danmarkar á Blindeinstitut í Ræsnes við Kalundborg.

Tá var lítið at fáa av klæðum, mamma samlaði genturnar saman at binda hosur, vøttir og húgvur til børnini á skúlanum, børnini vóru sera glað fyri hesar bundnu lutir, og skrivaðu takkarbræv heim til hennara.

Hon hevði eisini skaldargávur, hevur yrkt nógvar sangir, m.a.:

*Guds náði, hon er undurfull*
*Og meiri verd enn góðs og gull;*
*Takk, at tú okkum hevur vart,*
*Takk, at tú hevur lív várt spart!*

*Takk fyri, vit ta longu tíð*
*Við vinum fylgdust heimi í,*
*Takk fyri øll, sum kenna teg,*
*Við okkum ganga lívsins veg!*

*Vit lov og tøkk nú syngja tær,*
*At tú so trúgvur okkum var*
*Ígjøgnum hesi mongu ár –*
*Um runnið hevur mangt eitt tár.*

*Takk fyri gleði, sorg, tú gav,*
*Takk fyri djúpa náðihav,*
*Takk fyri sólskin, toku við,*
*Takk at tú ert við vára lið!*

Hesin sangur verður sungin við lagnum »Deep Harmoni«.

Vit báðir beiggjarnir plagdu at vera í Miklagarði, í Løðuni og aðra staðni, har fingu vit mangan góðan bita. Mamma hevði okkum við á møti í Miklagarði, hetta var áðrenn salurin Mizpa var bygdur. Hon lærdi okkum Guds orð, vit lósu fleiri kapitlar í Bíbliuni um dagin.

Hon kom nógv saman við Óluvu í Løðuni, Luffu í Miklagarði og Poulinu í Gimbrinum.

Tá prædikumenn komu til bygdina, komu teir altíð inn til okkara. Hon hevði eitt umfatandi brævaskifti við trúboðanina út í heimin, millum annað í Kina.

Orsaka av fallinum hon hevði fingið sum ung, var hon ofta á sjúkrahúsinum og hvíldarheiminum. Mín gongd tá eg kom niðri frá, var út á sjúkrahúsið ella niðan á hvíldarheimið, av tí sama var eg nógv hjá mostrum og mammubeiggjum í feriuni, hjá Kamillu á Toftum, Andreu í Leirvík, Sigrid í Havn, Frederik í Søldarfirði og Hjalmar og Leirvík. Eisini plagdu vit øll at vera nógv hjá Victor Danielsen í Fuglafirði.

Tá Dia beiggi mín var 14 ár, fór hann til skips við Føroyinginum, hann var eisini við Imanuel og Venus. So legðist hann upp á land og fór at koyra hýruvogn, hann giftist við Britt, tey fingu 4 børn, Theodor, Eyðun, Eydnu og Ragnar. Í 1965 1. januar fekk hann arbeiði sum portørur á Landssjúkrahúsinum, har var hann til hann doðyi 29.05.1993, hann var nógv avhildin. Hann gav eitt blað út í 5 ár sum kallaðist Vaktarin.

Malla var tey síðstu nógvu árini á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, og sigi eg tykkum takk fyri góða røkt. Eisini takki eg teimum á sjúkrahúsinum, hvíldarheiminum og heimarøktini.

Og vil eg hervið siga øllum, sum hava hjálpt okkum hesi mongu ár, hjartaliga takk fyri, og citera Jeremias kap. 49, v. 11. »Eg skal halda lívinum í teimum, og einkjur tínar kunnu líta á Meg«.

Hjartaliga takk til øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

Hervið lýsa vit frið yvir Theodor, Mallu og Dia.

Gunnar og Edith



# Møtast og skiljast



*Sundaberg kom aftur eystaneftir mikumorgunin. Teir hava 970 tons inni og vænta teir, at hesin túrurin verður tann størsti higartil í peningi*

**Mikunáttina fór Fuglberg av Klaksvík á Flemmish Kap á rækjuveiðu, og mikumorgunin kom Sundaberg aftur eystaneftir**

FISKISKAPUR

*Rúna Sivertsen*

"Møtast og skiljast er lívið her".

Summir fara, og aðrir koma; soleiðis er lívið hjá okkara sjófólki og familjum teirra.

Fuglberg steðgaði bara eina lítla viku heima hesaferð. Teir hava verið á Flemmish Kap á rækjuveiðu og løgdu 430 tons upp.

Fuglberg fór av Klaksvík um 1 tíðina mikunáttina, aftur á Flemmish Kap at royna. Teir vænta at verða burtur einar 2 mánaðir. 16 mans eru við Fuglbergi hendan túrin. Palli Sivertsen er skipari.

### Roktúrur hjá Sundabergi

Sundaberg kom aftur frá fiskiskapi eystanfyri mikumorgunin. Hesin túrurin hjá teimum var serstakliga góður. Teir byrjaðu túr tann 10. apríl og hava 970 tons av flaki inni. Lastin er sjálvsagt ikki seld enn, men teir vænta, at hesin túrurin verður tann størsti higartil hjá Sundabergi í peningi.

Fríggjadagin fer Sundaberg niður til Grimsby at selja; tað tekur væntandi eina viku. Teir ætla at verða klárir til fiskskap aftur tann 13. juli, tá ið hann fer at royna í russiskum sjógvi í Barentshavinum.

35 mans eru við Sundabergi. Tað var John Fuglø, ið førdi Sundaberg henda roktúrin.



*"Møtast og skiljast er lívið her". Summir fara, og aðrir koma; soleiðis er lívið hjá okkara sjófólki og familjum teirra. Ikki skerst burtur, at gott er at koma heimaftur*

# Manningin tjenti 350.000 kr. í slakar tríggjar mánaðir

**- Enn er lastin hjá Sundabergi ikki seld, og tí kenna vit ikki neyvu tøluni, sigur Hanus Hansen, reiðari hjá JFK-Troli í Klaksvík**

ROKTÚRUR

*Vilmund Jacobsen*

Sosialurin hevur spurt Hanus Hansen, reiðara hjá JFK-Troli, hvussu stórur manningarparturin umborð á Sundabergi er hendan túrin.

Sundaberg fór úr Føroyum, 10. apríl og var aftur á Klaksvík mikudagin. Hetta var ein roktúrur, 950 tons í flaki.

Hanus er sum vera man trekur at tosa um tøl, tí sum hann sigur: "So fær onkur ilt av hesum, tí hesaferð gekk tað so væl…"

Hann vísir á, at enn er lastin hjá Sundabergi ikki seld, og enn vita teir ikki nágreiniliga, hvussu sølan verður.

Sundaberg loysti úr Klaksvík í gjár og er nú á veg niður til Bretlands at selja.

- Vit vænta, at manningarparturin hendan túrin fer at liggja millum 300.000 og 400.000 kónur, tó helst nærri 300.000.

Hetta er tað einasta, vit fingu Hanus at siga okkum um inntøkuna.

Ikki tí; Hanus var bæði blíður og fryntligur at tosa við.

- Okkum hevur ikki dámað so væl at upplýsa inntøkuna hjá manningini, men tað er skjótt hjá hvørjum einstøkum at rokna seg fram til, hvat fæst burtur úr einum slíkum túri, sum í okkara verð telist millum teir bestu, sigur reiðarin, Hanus Hansen.

Tá ið Sundaberg er liðugur at landa, fer hann nýggjan túr eysturefir.

